nakrantíð verða rokkið á mál, ella skal tjóðini verða lív lagað og fólk skulu halda á at hava hug til at búgva í hesum avbera vakra og deiliga landi, - at verja um bæði mál og mentan.

– Tí verður aldri nóg mikið til av tilfari á okkara egna máli, løttum tilfari, gerandistilfari, men eisini av dýrum gimsteinum og perlum, ið mugu viðfarast við stórum ansni.

### Látur og grátur

Bókin sjálv *Undir egið borð,* ið nú liggur á borðinum við permuprýði, sum Bárður Jákupsson hevur gjørt, er ein íslendskur dýrgripur, eitt stórverk. Kanska eitt av týdningarmestu verkum, ið komið er út í Norðurlondum, og hon er farin víðari um enn flest aðrar bøkur. Har verður greitt frá íslendskum bónda, Bjarti í Ljósagerði, ið setur sær eitt ófrávíkiligt mál, at verða frælsur maður. Hetta er søgan um fæloysingin, um siðsemi og støðufesti, um ein virðiligan mann, ið verður virdur og vanvirdur, eitt menniskja, ið heldur á og leitar. Og kring henda mannin er náttúran, seyðurin, fuglurin, fjøllini og himmalin, húsfólkið og bygdin.

– Her eru nógvar síður og ymiskar lagnur, heimssøga og hjartalag, skrivað við so neyvari hond og so føstum stevi, at verkið situr eftir inni í tær sum tónaverk við føstum stevi og fløktum bygnaði, ein hárfín heild, ið nertur teg innanífrá, nemur við teg onkustaðni, har menniskjað er ein eind, og har eingin kann bera seg undan. Tú flennir í heilum, og tú tárar í støðum, sigur Þóra.

– Men kanska er høvuðspersónurin als ikki Bjartur í Ljósagerði, kanska er hann einans ein pallmynd, ein durahella ella inngongd til tað, sum hevur størsta týdning, lítla Nonna, dreingin við dreyminum, eygleiðaran, tann sum var og fer, kemur ikki aftur, men er og verður. Eftir okkara tykki er tað, ið hvussu so er, barnið í okkum, ið fær okkum at fella tár á blaðsíðurnar í hesi bókini, tár um okkum sjálv og um tað, sum vit koma frá og eru á veg til.




# Laxness í Føroyum

## Essay



**Turið Sigurðardóttir**

Skaldsøgurnar hjá Halldóri Laxness (1902-1998) hava borið navn hansara út um heimin, og fýra teirra eru tøkar á føroyskum. Men eisini í stuttsøgum er Laxness tikin úr leikum, og stuttsøgur ganga sum ein gyltur táttur gjøgnum alla hansara longu høvundarævi við liðina á skaldsøgunum. Í stuttsøgunum finna vit aftur ymisk evni, persónsmenskur, umhvørvi, stíl og frásøguhátt sum í skaldsøgunum. Onkrar stuttsøgur eru eins og forljóð ella leiðarmotiv til skaldsøgur, t.d. menniskja- og umhvørvislýsingin í stuttsøguni "Søga úr sildini" mótvegis skaldsøguni *Salku Valku.* Aðrar stuttsøgur eru eins og verkstøð, har skaldið roynir nýggjar leiðir í listini. Men um somu tíð eru tær eisini sjálvstøðugar søgur við sínum egna virði hvør sær.

### "Lilja" og "Søga og sildini"

Føroyingar fingu tíðliga áhuga fyri stuttsøgunum hjá Laxness: Í 1933, sama ár sum hon var útkomin á íslendskum, stóð "Lilja" í Varðanum, týtt hevði Chr. Matras (1900-88), sum í sama Varða eisini ummælti Salku Valku frá 1931-32. "Lilja" er um ein gamlan mann, sum eins og onnur er flutt úr heimbygdini til høvuðsstaðin, har hann doyr, einsamallur og – at vísa seg - gloymdur.

Í 1950 stóð aftur ein søga eftir Laxness í Varðanum, týðari var nú Per Mohr (1927-53) úr Hoyvík. Hetta var "Søga úr sildini" um ta avgomlu sildagentuna, sum strevar seg upp úr seingini og oman á sildaplanið at slagbeita, tá ið sildarokið byrjar aftur, eftir at sildin hevur svikið í mong ár. Henda elligamla konan, sum ikki veit um nakað annað enn at arbeiða, grætur, tá ið sonur hennara tekur knívin úr hennara slitnu, viknaðu hondum og sjúgvar hana til hús.

### Laxness í Glugganum

Í 1955 fór eitt nýtt, spennandi føroyskt bókmentatíðarrit, Gluggin, av bakkastokki, og straks fyrsta árið varð søgan "Nýggja Ísland" hjá Laxness prentað har, týðari var Oskar Hermansson (1920-95). Hetta er søgan um knæbóndan, sum tekur seg upp úr tryggum korum, selur jørð sína og heldur vestur um hav við konu og børnum fyri at nema land, bróta upp úr nýggjum og "leita eftir nógv betri framtíð fyri seg og børn síni" burtur í óbygdum í Kanada. Gluggin hevði aftur eina stuttsøgu eftir Laxness í 1960, nú í týðing eftir Ulf Zachariasen (1925-98). Tað var "Napolion Bonaparti" um tann fátæka bygdardreingin, sum misti seg sjálvan burtur í stórverksdreymum og ikki fann seg aftur, fyrr enn ov seint var. Tann triðja og seinasta stuttsøgan eftir Laxness í Glugganum var "Vøluspá á hebraiskum", 1962, eisini hesa søguna týddi Per Mohr. Men 1959-60 stóð fyrsti partur av *Íslandsklokkuni* sum framhaldssøga í Glugganum, brøðurnir Per og Janus Mohr høvdu týtt.

### Stuttsøgur hjá Laxness á føroyskum í 1980-árunum og fram

Nú gingu nógv ár, til fleiri stuttsøgur hjá Laxness komu á føroyskum. Men í 1988 stóð "Jógvan í Breyðhúsi" í týðing eftir undirritaðu í bókmentatíðarritinum Brá, ein vitur søga um fólk, ið hava mist tað tey hava trúð á í felag men eru ósamd um, hvat var. Og í 1993, 60 ár eftir at tann fyrsta stuttsøgan hjá Laxness kom á føroyskum, tók Varðin tráðin upp aftur og prentaði "Skjólið", týðari var Hjalmar P. Petersen, eina søgu um dagin tá ið tað mundi verið verðsins endi og um, hvussu ein drongur og hundur hansara komu ígjøgnum dagin. Síðani hevur undirritaða týtt tvær aðrar søgur, "Góðu gentu og Húsið" og "Corda Atlantica."

### Støðugt og vaksandi gildi

Stuttsøgurnar eftir Laxness, sum higartil eru týddar til føroyskt, eru frá einum 30 ára tíðarskeiði, árunum 1933 til 1964. Týðingarnar, harafturímóti, eru vorðnar til ígjøgnum eitt nógv longri tíðarskeið, árini 1933 til 2007, til samans 74 ár.

Tann nýggjasta av teimum fýra føroysku týðingunum av skaldsøgum hjá Laxness til er *Undir egið borð,* sum kom nú í heyst í týðing eftir Þóru Þóroddsdóttur og Martin Næs. Hetta er bókin um tað endurtikna landnám Íslands í túsund ár. Men hon er eisini bókin um ognarloysingin hvar sum helst í heiminum, í Føroyum, USA og Kina, hin æviga nýbrotsmaðurin, menniskjað sum skapar sær sína tilveru við egnum hondum.

> Hvat er ein verð? Hetta er verðin, verðin er her. Ljósagerði, jørðin hjá mær, tað er verðin. Og
> hóast tú ætlar at svølgja sólina eitt ørvitisbil, tí tú sært bláan pening úr 'Merika, sum sjálvandi er falspeningur sum allur stórpeningur, ið einstaklingurin fær upp í hendur uttan at hava gjørt
> nakað sum helst, so fert tú at ásanna fyrr ella seinni, at Ljósagerði, tað er verðin, og tá veit eg, at tú hugsar um tað, eg havi sagt.
>
> Undir egið borð, bls. 360

Í viðgerðini av skaldsøguni Undir egið borð tekur *Íslensk bókmenntasaga* (Mál og menning 2006) fram røðuna omanfyri. Høvuðspersónurin, rakbóndin Bjartur í Ljósagerði, heldur røðuna fyri syni sínum, sum ætlar at rýma vestur um hav, til Amerika. Orðini kunnu lesast sum eyðkennisorð hjá Laxness, tá ið hann skrivaði Undir egið borð, og tey bergmála orðini í Salku Valku, at heimurin er júst her "á Ósoyri." Halldór Laxness vildi hava Ljósagerði at rúma øllum heiminum. Tann stóra søgan um rakbóndan á lítlari jørð í íslendskari avbygd er eisini um hvørvisjónina, ástina og sorgina hjá øllum menniskjum.

### Frá tí tjóðarbundna til tað altjóðaliga

Tað er vert at geva gætur, at tann áhugin, sum føroyingar fingu fyri Laxness í 1930-árunum, hevur hildið sær og er vaksin. Men hetta er einki løgið, tí verk hansara eru sterkur skaldskapur um menniskju, soleiðis sum tey eru og liva í umstøðum meinlíkum okkara, men samstundis eisini um menniskju allastaðni á jørðini. Í Føroyum eins og í øðrum londum verður Laxness týddur, útgivin og útafturgivin. Hví? Tí hesi skaldaverk goyma virði, sum ikki minkar men veksur, tá ið av verður tikið.

